ÍF-KÍ 0-3 (0-1):

# Ónd ringrás hjá ÍF

**Heldur ikki hesaferð megnaðu fuglfirðingar at gagnnýta sínar møguleikar, og so vórðu teir ístaðin punkteraðir av málum frá mótstøðuni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Fyrstu løtuna spruttaðu fuglfirðingarnir nakað, men eftir at KÍ skoraði, tóktust heimamenninir fullkomuliga punkteraðir*
*Mynd: Bárður Lydersen*

Eftir fimm dystum við bara einum stigi sum úrtøku, slapp KÍ sær sunnudagin úr naggatódnini, sum liðið hevur verið í. Hetta tá teir í Fuglafirði vunnu ein tryggan 3-0 sigur.

Við hesum slapp KÍ sær kanska eitt sindur burturúr óndu ringrásini, sum liðið hevur verið í, men hinvegin tykist ÍF kanska at vera enda í eini tilsvarandi ringrás. Í øllum førum var hetta onnur ferðin á rað, at ÍF var fyri greiðum tapi, og eins og í Havn fyri viku síðani, so var leingi einki sum helst, sum bendi á, at talan skuldi gerast um greitt tap.

## Trilvandi byrjan

Fyrstu góðu løtuna av dystinum var tað nevnliga ÍF, sum tóktist vera betra liðið. Fleiri ferðir vóru teir eisini nær við at leggja seg á odda, men meira enn nær við komu teir ikki, og brádliga svaraði KÍ aftur í hinum endanum.

Heðin á Lakjuni, sum aftur hesaferð var ein av trimum framherjum, fekk bóltin. Hann dró nakað inn í vøllin, áðrenn hann langaði til, og so sang bólturin í meskunum.

Hetta gav nakað meira av friði á spælið hjá KÍ, sum fram til tá hevði verið rættiliga óskipað. Sum um trúðu spælararnir nú brádliga uppá, at tað eisini bar til hjá teimum at vinna.

## Óttaðust endurtøku

Hinvegin mundu fuglfirðingar missa pippið eina løtu. Kanska leitaðu tankarnir ov nógv aftur til Gundadal og stórtapið, sum teir tá vóru fyri, og sálarliga var talan í øllum føurm um minst eitt stig aftur eftir hæli, so at siga.

Og nú var tað eisini KÍ, sum stóð fyri tí nógva. Pressið móti ÍF riggaði heilt væl til tíðir, soleiðis at bólthaldarin alla tíðina var undir trýsti, samstundis sum møguleikararnir at sleppa av við bóltin vóru fáir, og hetta gav ofta úrslit í, at KÍ antin vann bóltin og kundi fara í skjótt álop, ella at fuglfirðingar sendu langt og høgt móti álopinum, har tað aloftast var Niklas Niclassen, sum var hægstur í luftini.

Og beint fyri steðgin fingu teir eisini málið, sum mest sum punkteraði spenningin. Eftir at hava vunnið bóltin, varð spælt skjótt niðaneftir, og áðrenn ÍF-verjan var komin upp á pláss, fekk Heðin eina góða sending, sum hann eisini hagreiddi væl og virðiliga.

## Einvegis

Eftir steðgin megnaði ÍF ongantíð veruliga at koma aftur í dystin. Klaksvíkingar ætlaðu sær so undir ongum umstøðum eina endurtøku av avrikinum móti NSÍ á heimavølli, har ein 2-0 leiðsla varð tveitt burtur.

Og á tímanum fall triðja málið eisini, og var uppskriftin neyvt tann sama, sum tá Heðin økti til 20. Hesaferð varð tvørbólturin tó sendir til Ova, og hann ivaðist ikki, men langaði í meskarnar.

Og heldur enn at munurin skuldi minkað, tóktist meira sannlíkt, at hann skuldi økjast. Fleiri ferðir var nær við, og millum annað hevði ein hart arbeiðandi Hjalgrím Elttør einar tvær ferðir upplagdar møguleikar. Tvær ferðir hevði linjuverjin eisini flaggið á lofti, tá gestirnir hildu seg hava skorað, men alt í alt, so kundi hetta neyvan oyðileggja nakað av gleðini. Enn er KÍ tó ikki serliga væl við í kappingini, men teir fingu loksins ein sigur, og so er spurningurin, um hesin var tað lyftið, sum skuldi til, fyri at teir bláu loksins kunnu stremba móti oddinum, har teir halda seg hoyra heima.

### Fakta um dystin

**ÍF-KÍ 0-3 (0-2)**
0-1: Heðin á Lakjuni, 38.
0-2: Heðin á Lakjuni, 43.
0-3: Ove Nysted, 62.
Dómari: Birgir Sondum
ÍF: Allan Joensen – Fritleif í Lambanum (Roy Róin, 65.), Poul Ennigarð, Símun Eliasen, Rúni Elttør – Hanus Eliasen (Atli Petersen, 62.), Høgni Zachariasen, Eyðolvur Petersen, Magni á Lakjuni (Bárður á Lakjuni, 80.) – Gunnar Nielsen, Sylla Amed Davy
KÍ: Karstin Joensen – Kristoffur Jakobsen, Jan Andreasen, Niclas Niclasen, Leon Bjartalíð – Høgni Madsen (Julian Samuelsen, 84.), Hjalgrím Elttør (Sigmund Jacobsen, 81.), Atli Danielsen – Arnold Joensen (Erling Fles, 80.), Ove Nysted, Heðin á Lakjuni.
GK: - Leon Bjartalíð, Høgni Madsen.

## Hatta trongdi til

Tað er eingin loyna, at trýstið á klaksvíkingum hevur verið stórt seinastu tíðina. Fimm dystir við bara einum stigi er vánaligasta røðin í langa tíð hjá felagnum, og í einum ári, har ein topp-plasering var málið, hevur hetta á ongan hátt verið nøktandi.

Tí er heldur einki at siga til, um spælararnir vóru eitt sindur lættari um hjartað, nú tað eydnaðist at fáa trý stig til høldar, og lætti er helst orðið, sum best myndaði huglagið hjá Ova Nysted, tá vit fingu orð á hann mánakvøldið.

- Hetta ger í øllum førum, at vit sleppa eitt sindur burtur úr trýstinum, sum hevur verið á okkum seinastu tíðina tíðina, segði hann, men hann var tó skjótur at leggja afturat, at enn er ikki slopp-ið.

- Nei, málið er so langt ífrá rokkið enn, men sum sagt, so fingu eitt sindur av luft við sigrinum. Skulu vit fram í oddin, so eru treytirnar tó púrasta greiðar. Nú skulu trý stig á borðið - hvørja einastu ferð. Megna vit ikki tað, so verða vit púrasta afturúrsigldir.

-jm

# Skráin hevur kostað

Í ÍF hevur fótbóltslagið í vár verið so gott, sum tá sjáldan plagar at vera, men seinastu vikan hevur tó ikki verið ein stuttlig, sum hinar. Tveir dystir, einki stig og 0-9 í málmuni var helst ikki júst tað, sum vónirnar vóru til, og Eyðolvur Petersen ásannaði eisini eftir dystirnar mánadagin, at hetta hevði ikki verið nóg gott.

- Fyrsta orsøki til sigurin hjá KÍ í dag er helst, at teir spæla ein góðan dyst. Men eg kann ikki lata vera við at iðra meg um, at vit ikki eru nóg skarpir, tá vit hava møguleikarnar.

Eru tit farnir niður við høvdinum, nú tit tvær ferðir á rað hava tapt stórt?

- Nei, tað haldi eg ikki. Men kanska hevur dystarskráin í seinastuni verið ov hørð hjá okkum.

- Men tað skal kortini ikki vera nøkur umbering, tí hini liðini hava eisini havt tað hart. Veruleikin er bara, at tað í dag ikki hekk nóg væl saman hjá okkum. Kanska eru tað umskipanir á liðnum, sum merkjast, og eitt nú hava vit ikki Bartal við í dag. Men samanlagt var tað ikki nóg gott. Tí var sigurin hjá KÍ kanska í lagi, men 3-0 var altso í yvirkantinum, heldur Eyðolvur.

Men hóast tey bæði tapini í seinastuni, so er ÍF framvegis hampuliga væl fyri á stigatalvuni. Eitt pláss í miðjni var helst eisini tað, sum flestu fuglfirðingar vónaðu fyri kappingarárið, men tá vit spyrja, so er Eyðolvur kortini ikki nøgdur um hetta.

- Tað var helst eingin, sum hevði roknað við góðu byrjanini, sum vit fingu. Men tá vit nú høvdu staðið okkum somikið væl, so gerst tað bara enn beiskari at tapa tvær ferðir á rað. Ikki minst, tá hini úrslitini mest sum hava lagað seg til okkara. Høvdu vit ístaðin havt vunnið hesar báðar dystirnar, so vóru vit á øðrum plássinum!

- Men vit mugu so bara ásanna, at vit ikki hava tikið av møguleikanum, og so mugu vit annars syrgja fyri at vinna, tá EB/Streymur kemur á vitjan næsta vikuskiftið.

-jm